Jørgen Niclasen heldur røðu í Hørpuni í Reykjavík.Mynd Jan Müller

Jørgen Niclasen: Tøkni fer at vinna á dálkan

Jan Müller

17.10.2015 - 16:26

Oljan.fo

Jørgen Niclasen, limur í Útnorðurráðnum, luttók á Arctic Circle ráðstevnuni í Reykjavík nú um dagarnar, og har umrøddi hann, hvussu veðurlagsbroytingarnar verða settar á dagsskrá.

Forsetin í Fraklandi, Francois Holland, forsetin í Íslandi, Ólafur Ragnar Grímsson, Prins Albert úr Monaco, uttanríkisráðharrin í Kina, Wang Yi, søgdu eisini allir sína hugsan um, hvussu støðan við veðurlagsbroytingunum skal loysast, tá teir hildu sínar røður, tá ráðstevnan Arctic Circle bleiv sett fríggjadagin 16. oktober.

Útnorðurráðið og umleið 2000 aðrir luttakarar úr 50 londum eru í Reykjavík, har framtíðin í Arktis er til viðgerðar um vikuskiftið.

Útnorðurráðið hevur ein aktivan leiklut á ráðstevnuni og millum annað helt Jørgen Niclasen eina røðu á fundinum ”Arktis og alheims veðurlagsdiplomati”. Franski senatorurin André Gattolin skipaði fyri fundinum.

Í røðu síni legði Jørgen Niclasen dent á fíggjarliga partin av spurninginum um veðurlagið. Hann tosaði um íløgurnar í Útnorði síðan 2005.

"Millum annað íløgurnar í grønari orku, vindmegi í Grønland, vindmegi í Føroyum og jarðhita í Íslandi; Hesar broytingar hava ikki einans hjálpt veðurlagnum, men peningur er eisini spardur. Steinøldin helt ikki uppat, tí eingir steinar vóru. Tøknin fer at vinna á dálkan," segði Jørgen Niclasen millum annað.

Til framløguna var eisini Kári P. Højgaard, sum er formaður fyri føroyska partin av Útnorðurráðnum. Harumframt lýddu fleiri føroyingar eisini á, eitt nú løgmaður.

Stutt um Útnorðurráðið:

Útnorðurráðið er formella samstarvið millum tingini í Grønlandi, Føroyum og í Íslandi. 18 limir sita í ráðnum. Seks úr hvørjunm landi. Formansskapurin er mannaður av formanninum Lars-Emil Johansen, formaður fyri grønlendska landstinginum. Unnur Brá

Konráðsdóttir,varaforkvinna og limur í Altinginum, og **Kára Páll Højgaard,** *2. varaformaður og limur í løgtinginum.*

REYKJAVIK
ARCTIC CIRCLE
ICELAND

REYKJAVIK
STIC CIRCLE

ARCTIC CIRCLE

REYKJAVÍK
CTIC CIRCLE
ELAND

ARCTIC CIRCLE

ARCTIC CIRCLE

ARCTIC CIRCLE